

# Rokna við enn lægri oljuprísi í 2016

**Jógvan Hugo Gardar**

02.12.2015 - 10:15

Oljan.fo

Hóast greinarar hava roynt at finna orsøkir til at gita at oljuprísurin ikki kemur at lækka meir, so síggja fleiri orsøkir til at vit ikki hava sæð lægsta oljuprísin enn síðani oljuprísurin fór at lækka á sumri 2014.

Hesa seinastu tíðina hevur prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent sveiggja millum knappar 45 og 50 dollarar.

CNBC hevur spurt oljugreinarar um hvat teir rokna við kemur at henda við oljuprísinum í 2016. 46 prosent av greinarunum rokna við at oljuprísurin kemur at lækka til eitt lægri støvi enn tað vit higartil hava sæð. Og teir halda at lægsti prísur kemur at vera í fyrra hálvári.

29 prosent av greinarunum halda at ein lækking kann koma skjótari, helst longu í fyrsta ársfjórðingi